# *Grindaprísir og skinnatal 1584-1638*

*Arne Thorsteinsson*
Føroya Fornminnissavn, Hoyvík, Postboks 1155, FR-110 Tórshavn, Faroe Islands

## Úrtak

Grindalógir og rættar reglur verða á fyrsta sinni samskipað í Grindareglugerðini frá 1832, men nútíðar granskarar halda tó skinnatalið í grind vera avgamalt. Endamálið við hesi kanning er at greina, hvat skinnatalið í grind er, og hvussu gamalt tað er.

Heitini gyllin og skinn vísa aftur til føroysku pengarokningina frá seinmiðøld til 1790. Skinnatalið er í sínum uppruna ein virðismeting, ið er grundað á prísleguna, sum hon einaferð var. Men grindaprísir og skinnatal eru sum frá leið loysnað hvørt frá øðrum, og skinnatalið er vorðið eitt abstrakt hugtak uttan samband við dagsprísin, men grundað á avoldaða príslegu.

Við fútaroknskapunum sum høvuðskeldu eru allir upplýsingar um hvalatal, meting og úrtøku kongs í tali og virði í øllum grindum úr tíðarskeiðinum 1584-1638 vorðnir kannaðir og bornir saman við lógarreglunum fyri grindaskifti.

Niðurstøðan gjørdist, at í hesum tilfari finna vit eina príslegu, sum er fleiri ferðir hægri enn tað skinnatalið, vit kenna nú á døgum, meðan metingin, skinnatalið í grind, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis verður nevnd. Stuðlað av frágreiðing Lucas Debesar frá 1673, sum heldur ikki nevnir metingina, verður komið til ta niðurstøðu, at almenna metingin av grindini – og harvið skinnatalið í grind – er fyriskipað í tíðarskeiðinum 1673-1709.

Í 1700 árunum verða upplýsingarnir um grindaskiftið nógv rúgvismiklari og fjøllbroyttari. Við framhaldandi rannsóknum hevði borið til at kanna, hvussu skinnatalið festir seg, hvussu hvalvágirnar so við og við verða lagdar saman og hvussu tann tiltikna sosiala javnanin í grindaskiftinum tá veksur fram.

## Abstract

Price and Assessment of Pilot Whales 1584-1638

The assessment of pilot whales is codified for the first time in the pilot whale regulation of 1832, although contemporary research workers consider the number of „skinns“ (standard of value for pilot whale) very old. This examination aims at analysing the amount of „skinns“ in the pilot whale and its age.

The appelations „gyllin“ and „skinn“ refer to the Faroese monetary units of the Late Middle Ages up to 1790. Originally the number of „skins“ was based on an evaluation that was built on the contemporaneous price level. But the price of pilot whale and the number of „skinns“ have gradually drifted apart, and the number of „skinns“ have become an abstraction which has no connection to the current price but which is founded on an obsolete price level.

Using the accountancy of the administrative officer in the Faroe Islands as the principal source, the entire information on the number as well as the value of all the pilot whales during the period 1584-1638 have been investigated and compared with the lawful distribution of the pilot whale catch.

The conclusion is that in this material we find a price level which is several times as high as the number of „skinns“ that we know at the present, whereas the evaluation, i.e. the number of „skinns“ of the pilot whale, is neither mentioned directly or indirectly. A conslusion, based on a statement of Lucas Debes (from 1673) which does not mention the evaluation either, is made that the official evaluation of the pilot whale – and thus the number of „skinns“ in the pilot whale – has been fixed during the period 1673-1709.

During the years after 1700 the information on the lawful distribution of the pilot whale catch becomes more extensive and varied. Further research will make it possible to examine how the number of „skinns“ is fixed, how the recognized ports for hunting pilot whales gradually are being united and how the notorious social equalization of the distribution springs up.

Fróðskaparrit 44. bók 1996: 57-77

## Inngangur

Tá grind hevur lagt beinini á eini hvalvág, verður hon nú á døgum mett í skinnatal, áðrenn skift verður. Skinnatalið er í dag ein neyðug fyritreyt fyri grindaskiftinum. Hvør einstakur grindahvalur í eini grind verður undan skiftinum mettur til ávíst skinnatal, upp í gyllin og hendingaferð nøkur fá skinn upp um gyllin, og er samlaða skinnatalið í grindini grundarlagið undir grindaskiftinum. Grindareglementið frá 1832 er elsta fyriskipan, vit kenna fyri, hvussu grindin skal verða mett: Hvalur, sum er 5 alin frá eyga til got, verður mettur til gyllin, og aðrir hvalir í mun til hetta.

Hvat er skinnatalið í grind og hvussu gomul er grindametingin?

Nútíðar granskarar halda, grindametingina vera avgamla. Louis Zachariasen (1959-61:87ff) nevnir fleiri ferðir skinn í grind í tíðarskeiðinum 1584-1638 og nevnir, hvussu grindaprísurin tá er í mun til grindaskinnið. Bloch og Zachariassen (1989:39-40) siga skinnatalið vera skrásett aftur til 1584. Sjálvur havi eg lítið fingist við hval áður, men eg havi í sambandi við greining av virðismetingum sum heild eisini nortið við grindametingina (1993:9), og havi tá hildið tað verið hugsandi, at grindametingin hevur verið til í 1584, og at hon hevur verið grundað á príslegu, eldri enn 1584.

Fyrsta umrøða av grind í Føroyum er frá 1584. Í tíðarskeiðnum 1584-1638 eru í roknskaparbókum fútans skrásettar 44 grindir, sum kongur hevur havt inntøku av. Næstu 70 árini er lítið og einki til av upplýsingum um grind. Ikki fyrr enn keldutilfarið aftur gerst rúgvismiklari eftir gablatíðina, finna vit grindametingina umrødda á fyrsta sinni (Kommissionsbetænkningen, 1709-10:79).

Henda kanning hevur sum høvuðsendamál at fáa greiðu á, um vanliga uppfatan okkara, at grind eisini í tíðarskeiðinum 1584-1638 hevur verið mett í skinnatal í sambandi við grindaskiftið eins og nú á døgum, er haldgóð. Er hon ikki tað, ber als ikki til at tala um skinnatal í grind fyrr enn 1709.

Fyri at kunna lýsa hesar spurningar gjølligari havi eg við fútaroknskapunum 1584-1638 sum høvuðskeldu roynt at greina allar upplýsingar um grindaskifti og -prísir úr tíðarskeiðinum 1584-1638.

## Prísur og meting

Skinnatalið í grind vísir aftur til ta peningarokning, sum varð nýtt í Føroyum frá seinmiðøld, 1400 talinum, til 1790. Henda peningarokning, 1 gyllin = 20 skinn, byggir á rhínskan gullmynt (Zachariasen, 1959-61:386,392). Fyri at fáa henda mynt – ella samsvarandi virði í innfluttningsvørum – skuldi ein í Føroyum í seinmiðøld og seinni lata 20 seyðaskinn. Peningarokningin í skinnum er sostatt føroyska ískoytið til rhínsku peningarokningina, sum nýtt varð í Føroyum.

Gyllinsvirðið var í langar tíðir fast knýtt at vekteindini vág í fleiri bólkum av útflutningsvørum: 1 vág í fiski, ull, tálg, fjøður v.m. kostaði 1 gyllin, og henda príslega var so føst í so langa tíð, at skinnatalið trongdi inn í vektskipanina. 1 skinn gjørdist – umframt at vera ein peningaeind – eisini 1/20 av eini vág (Zachariasen, 1959-61:393)

Vanligt var – og er – at nevna ávísar

mongdir av eini vøru við peningavirðinum. Tá eg var smádrongur keyptu tey fyri 1 kr í te, nú á døgum keypa tey fyri 200 kr í benzin heldur enn ávíst litratal. Tá prísirnir hækka, lata tey sama krónutal, men fáa minni fyri tað. 200 kr í benzin er sostatt ikki eitt ávíst litratal av benzin, men so mangir litrar, tey eftir galdandi dagsprísi kunnu fáa fyri 200 kr.

Øðrvísi er, tá prísurin festir seg sum heiti. Sum smádrongur keypti eg 10-oyra-køkur frá kondittaranum á Tvøroyri. Tær kostaðu tá 25 oyru. Heitið høvdu tær fingið fyri mína tíð, tá tær veruliga kostaðu 10 oyru, men príshækkingin hevði ført við sær, at nú var tað navnið á hesi ávísu køku.

Fastognir vórðu – og verða – eisini nevndar við prísi. 1 gyllin í jørð er tann jørð, tey einaferð í tíðini kundu keypa og selja fyri ein gyllin í peningi. Jørð, sum hvørki varð keypt ella seld, varð eisini virðismett eftir galdandi dagsprísi. Á tann hátt fingu vit umleið 1600 ella fyrr ta jarðarrokning, vit enn nýta: 1 mørk à 16 gyllin à 20 skinn, tí dagsprísurin um 1600 var 16 gyllin fyri 1 mørk í jørð. Tá prísirnir síðan hækkaðu, varð ávísa jørðin, sum søgd varð at vera ein gyllin, framvegis tann sama. Tey noyddust tí at lata fleiri gyllin í peningi fyri ein gyllin í jørð. Jarðarmetingin í gyllin gjørdist sostatt eitt abstrakt hugtak uttan samband við dagsprísin, men grundað á avoldaða príslegu.

Hesi dømi vísa, at prísir kunnu festa seg sum heiti á ávísa mongd av vøru ella fastognum. Hesi prísheiti er tað, sum nevnt verður meting. Við óbroyttum prísum eru prísur og meting tað sama. Men broytist príslegan, verða prísur og meting hvørt sítt. Metingin verður eitt abstrakt hugtak, ið vit kenna sum markatal í jørð ella skinnatal í grind. Vit kunnu eisini siga, at jørðin ella grindin fær eitt fast áljóðandi virði umframt skiftandi prísir eins og nútíðar virðisbrøv.

Her eigur at verða skoytt upp í, at vit vanliga eisini nýta orðið meting í sambandi við prísmeting, áseting av røttum dagsprísi, og í sambandi við mongdarmeting, áseting av tí mongd av vøru, ið samsvarar abstrakta prísheitinum.

Skinnatalið í grind er eitt typiskt dømi um eina meting, sum samsvarar einum abstraktum hugtaki, sum einaferð var ein prísur. Onkuntíð kostaði 1 skinn í grind veruliga 1 skinn í peningi, men ikki longur. Sjálv peningarokningin í gyllin og skinn er ikki til longur. Eftir at tað ikki longur snýr seg um eina virðismeting í dagsprísi, er sjálvsagt neyðugt við øðrum hjálpitólum enn dagsprísinum at finna fram til ta mongd av grind, ið er 1 skinn. Í praksis er tað hvør einstakur hvalur, sum verður mettur til eitt ávíst skinnatal, og hjálpitólið hevur í minsta lagið síðan 1832 verið mátið frá eyga til got.

### Lógargrundarlagið undir grindaskiftinum

Lógargrundarlagið undir grindaskiftinum í hesum tíðarskeiði er Landslóg Magnus Lagabøtara frá 1274 (MLL) og síðan Norska Lógbók Chr. IV frá 1604 (Chr. IV NL). Rættarbótin Seyðabrævið frá 1298 hevur eisini reglur um hval, men tær eru ikki tiknar við í Seyðabrævinum frá 1637 og hava tí neyvan verið nýttar í hesum tíðarskeiði. Elsta lýsing av grindaskifti í praksis er at finna hjá Lucas Debes 1673.

Meginreglan um hvalaveiði í MLL er, at veiðin er frí (MLL VII-64-8:«Nu kan folk veide hval, hvor de kan —-«). Hetta veiðifrælsi er endurtikið í Chr. IV NL (VI-LXI:«Hual maa huer mand skiude —-«). Ognarrætt veiðimansins til veidda hvalin er eingin ivi um, tá veiðin fer fram á havi (MLL VII-64-9: »Nu veider nogen hval og den dør paa dypet, da eier han hvalen —-«. Chr. IV NL VI-LXI: »Skiuder mand hual, oc hand flyder paa dybit: da ejer hand den —-«. Øðrvísi er, um skutlaður hvalur í sambandi við veiðina kemur so nær landi, at hann stendur fastur, tá skal jarðarhvalur verða latin.

Veiðifrælsið tykist tó bert hava umfatað einstakar hvalir, sum hava verið veiddir við skutli, ikki bólkar av hvalum, har neyðugt var við skipaðari veiði. Í hvussu er, hevur grindaveiði ikki verið frí í Føroyum í yngri tíð (Bjørk, 1963:165,168). Fyri tað tíðarskeið, sum her verður viðgjørt, hevur sakarmálið móti Ólavi Larvassyni í 1619 (Tingbókin, 1615-54:111) serstakan áhuga. Ólavur Larvasson var stevndur fyri rættin fyri sama ár at hava skutlað 3 grindahvalir út fyri Hvalvík. Hann varð fríkendur »Efterdi alle andre Baade vare rømt bort fra Hvalene«. At Ólavur yvirhøvur hevur verið stevndur, kann tykjast stríða ímóti galdandi lóg um veiðifrælsi og kann einans verða tulkað so, at í 1619 hevur grindaveiði ikki verið frí fyri hvønn mann sær, men hevur verið skipað veiði. At hann verður fríkendur við nevndu grundgeving er somuleiðis í samsvar við ta skipan, vit seinri finna kodificeraða í grein 11 í *Reglement for Grindefangsten paa Færøerne* frá 1832, at grindin kann verða givin upp fyri skutil. Í 1619 tykjast tó ikki so neyvar reglur at hava verið fyri hesi støðu. Sýslumaður ella grindaformenn tykjast eftir dóminum ikki at hava skula tikið avgerð um at geva grindina upp fyri skutil. Frídømingin byggir á tað veruligu støðuna, at bátarnir vóru farnir frá grindini.

Spurningurin um fría ella skipaða veiði hevur týdning fyri metingina um, hvørjar lógargreinir hava verið galdandi fyri grindaveiði í Føroyum. Bjørk vísir til Gulatingslóg 149,6 og 150,3 (Bjørk, 1963:168), men Gulatingslógin var ikki galdandi lóg í Føroyum í her viðgjørda tíðarskeiði. Samsvarandi greinirnar í MLL eru VII-64-10 og VII-64-16 og 17. Grein VII-64-10 snýr seg um skutlaðan hval, ikki um hvalarakstur og kann tí neyvan hava havt gildi fyri føroyska grindaveiði. Grein VII-64-16 snýr seg um at reka hval inn í annan mans hvalvág uttan loyvi. Hvalvág merkir ikki tað sama í Noregi sum í Føroyum (Bjørk, 1963:166; Johnsen, 1962:163-64), og grein VII-64-16 kann neyvan hava verið nýtt í sambandi við føroyskt grindadráp, sum eisini Bjørk ger vart við.

Einasta lógargrein í MLL, sum tykist nýtulig í sambandi við skipaðan rakstur og veiði av bólki av hvalum er MLL VII-64-17: »Nu driver nogen hval ind i vaager, som ikke før er hvalvaager; da eier veideren halvdelen og vaageieren halvdelen«, samsvarandi hevur Chr. IV NL VI-LXI: »Driffuer nogen hual ind i vijg paa anden mands jord, som icke er hualgaard: da beholde de dem begge til halffnit«.

Eftir galdandi lóg í tíðarskeiðinum eiga grindamenninir sostatt helmingin av grindini og jarðareigararnir hin helmingin. Soleiðis er grindaskifti eisini farið fram sam-

bært Lucas Debes (1673:159), tó eftir at fyrst tíggjund og síðan finningarfiskur eru tikin av.

Reglurnar í Seyðabrævinum frá 1298 um grindaskifti samsvara hvørki lóg ella praksis: »Nú reka menn hval á land, teir sum ikki eiga jørð fyri oman og veiða og bjarga úr flóðarmála, teir skulu hava fjórðing burtur av« (Seyðabrævið, 8.grein). Ongar av reglunum um hval eru tiknir við í Seyðabrævinum frá 1637.

Louis Zachariasen (1959:96) metir, at lóggávan um grindaskifti hevur ikki strangliga verið nýtt í 1500-1600 árunum. Men heldur ikki ásetingarnar í Seyðabrævinum heldur hann hava verið nýttar seinra part av miðaldri, men óivað undan Svartadeyða.

Bjørk (1963:168-69) heldur, at tá grindamenninir eftir Seyðabrævinum bert fáa 1/4, hevur jarðarhvalurin verið restin av grindini, 3/4, og at ásetingin í Seyðabrævinum kann hava verið ein føroysk serskipan fyri jarðarhval, sum tó er burturfallin í 1637 og ætlandi er farin úr brúki nógv fyrr.

Semja tykist sostatt vera um, at grindaskifti eftir Seyðabrævinum hevur ikki verið í gildi í tíðarskeiðinum 1584-1638, men óivað til onkuntíð í miðøld. Ein nógv gjølligari kanning av øllum reglum fyri skothval, hvalarakstur, rekahval á havi og rekahval á landi í miðaldar lógarverkinum er uttan iva neyðug fyri til fulnar at fata almennar reglur og serskipanir fyri Føroyar í hvalaskifti millum skotmann, finnara, rakstrarmenn, jarðareigarar og kong. Hetta hevði havt týdning ikki einans fyri fatanina av grinda- og døglingaskiftinum, men eisini fyri býtið av tí nógva rekahvali, sum er umrøddur í keldunum og eins og grind hevur verið virðismettur í skinnum (Bjørk, 1963:173) – og fyri fatanina av rættarbótunum í Seyðabrævinum. Slík kanning liggur uttan fyri evnið her, men um ásetingarnar í Seyðabrævinum havi eg tó hug at viðmerkja, at hóast rakstrarmennirnir einans fáa 1/4 í teirra part, er tað ikki ein neyðug fylgja, at jarðarhvalurin er 3/4. Sum áður ávíst er henda tulking í stríð við alt, vit annars vita um býti av riknum hvali, bæði yvirhøvur í Gulatingsdøminum og í Føroyum. Reglan um partin hjá rakstrarmonnunum stendur í Seyðabrævinum í framhald av regluni um tann part, sum húskallar bóndans skulu fáa burtur av skipsfarmi, teir skera av funnum hvali á havi, og sum heldur ikki samsvarar reglunum í MLL – teir fáa bert 1/7, har teir eftir MLL skuldu fingið alt. Bjørk (1963:171) tulkar hetta soleiðis, at talan her er um býti millum bóndan og húskallar hansara, sum eru í vinnu hjá honum og rógva út fyri hann. Hesum taki eg undir við, men tá henda reglan snýr seg um rættarviðurskiftini millum bónda og húskallar, og sostatt um eitt innanhýsis býti av lógliga partinum hjá finnaranum, er ikki óhugsandi, at teir »menn« sum verða nevndir beint eftir, eru somu húskallar bóndans, og at fjórðingur teirra er 1/4 av rakstrarpartinum eftir MLL, meðan bóndin, teir eru í vinnu hjá, eigur hinar 3 partarnar av rakstrarpartinum. Við hesi tulking verður samsvar millum lóg og praksis øðrumegin og rættarbótina Seyðabrævið hinumegin.

Hvussu var og ikki, so man full semja vera um, at í tíðarskeiðinum 1584-1638 er grindin skift javnt millum rakstrarmenn og jørðina eftir at tíggjund og finningarfiskur vóru tikin burturav.

**Peder Claussøn 1632**

Elsta kenda frásøgnin um grindaveiði í Føroyum – og einasta úr hesum tíðarskeiði – er at finna í bókini hjá Peder Claussøn (1632:152) í tí brotinum, sum hann nevnir »Nogit mere om Færøes leilighed«, og sum hann hevur skrivað í 1592 eftir frásøgn frá føroyska studentinum í Bergen Jacob Oudensøn. Tíverri verður bert raksturin og partur av drápinum lýstur. Einki verður sagt um skiftið.

**Fútaroknskapirnir 1584-1638**

Fútaroknskapirnir eru høvuðskeldan til kunnleikan um grind í tíðarskeiðinum 1584-1638. Roknskapir fútans vóru gjørdir á hvørjum ári, eisini undan 1584, men mangir teirra eru horvnir. Teir, sum varðveittir eru, eru frá 1584, 1588, 1590, 1600-01, 1601-02, 1602-03, 1613-14, 1614-15, 1615-16, 1617-18, 1618-19, 1619-20, 1620-21, 1621-22, 1622-23, 1623-24, 1624-25, 1626-27, 1627-28, 1628-29, 1629-30, 1630-31, 1632-33, 1633-34, 1634-35, 1635-36, 1636-37, 1637-38 og 1638-39. Í tíðarskeiðinum 1638-1653 eru fleiri roknskapir til, men teir geva so lítið av upplýsingum um grind, at teir ikki eru nýtuligir í hesi kanning.

Fútaroknskapirnir eru á danska Ríkisskjalasavninum, men Føroya Landsskjalasavn hevur ljósrit av roknskapunum frá 1584-1653.

Roknskapirnir eru yvir inntøkur og útreiðslur kongs av Føroyum.

Millum inntøkurnar er landskuld av kongsjørðini, kongstíggjundin, festigjøld, bøtur til kongs, inntøkur av hvali og reka v.m. Tað, sum her hevur áhuga, er hvalaroknskapurin.

Hvalaroknskapurin fevnir um inntøkur kongs av hvali, t.e. inntøkur av grindaveiði, døglingaveiði og deyðum rekahvali.

Í fútaroknskapunum er grind ongantíð nevnd við navni, í staðin verður sagt smáhvalur. Við hvørt kann tí vera ivasamt um talan er um grind ella annan hval, og eisini um talan er um veiði ella rekahval.

Inntøkur kongs av grind vóru jarðarhvalur og kongstíggjund. Kongur tók sjálvur jarðarhvalin av kongsjørðini, jarðarhvalur hevur tískil ikki verið burturfestur saman við jørðini og øðrum jarðarrættindum. Kongstíggjundin var 1/4 av allari tíggjund fram til 1688, tá tíggjundabýtið varð broytt við Norsku Lóg Chr. V. Eftir 1688 varð tíggjundin býtt í triðjingar, og kongur fekk tá 1/3. Ivasamt kann vera, um hvalatíggjundin í fútaroknskapunum er at finna í tíggjundaroknskapinum ella í hvalaroknskapinum, men eitt sum bendir á, at tíggjundin er at finna í hvalaroknskapinum, er at einki lýsi er at finna í nøkrum tíggjundaroknskapi, hóast lýsi var at kalla einasta gjaldsvøra fyri hval frá 1613. Tað má tí verða hildið, at hvalaroknskapurin eisini fevnir um kongstíggjundina av hvali.

Í tíðarskeiðinum 1584-1638 eru 44 grindir skrásettar. Onkrir av hesum tilburðum eru ivasamir at rokna sum grindadráp, sum seinri skal verða greiniligari lýst, men við teimum mongu árum í huga, har eingin roknskapur er varðveittur, kunnu vit rokna við, at veruliga talið á grinddrápum hevur verið væl størri enn 44 í tíðarskeiðinum.

*Talva 1. Grindir 1584-1638*

| FR | ÁR, DAGUR | STADUR | H | K | GL | SK | GJALD |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1584 | 1584-06-24 | L.Dímun | 4 | - | 4 | 10 | Fisk:2 vágir, Rest 2.5 gl |
| 1588 | 1588 | Skálafirði | - | 23 | 43 | 5 | Ymisk vøra |
| 1600- | 1599-11-14 | Norð í Vági | 90 | 23 | 55 | | Fisk: 55 vágir |
| 1601- | 1600-09-04 | Hvalvík | 24 | 8 | 20 | | Fisk: 20 vágir |
| 1602- | 1602-08-08 | Streymnes | 60 | - | 48 | 10 | Rest |
| 1613- | 1613-05-22 | Norð í Vági | 30 | 8 | 19 | 5 | Lýsi: 19 vágir 5 sk |
| 1613- | 1613-07-14 | Vestur í Vágum | 50 | 7 | 15 | | Lýsi: 15 vágir |
| 1614- | 1614-07-05 | Oyri & Streymnes | 72 | - | 125 | | Lýsi:125 vágir |
| 1614- | 1614-07-08 | Vestur í Vágum | 37 | - | 10 | | Lýsi: 10 vágir |
| 1614- | 1614-08-18 | Hvalba | 50 | - | 25 | | Lýsi: 25 vágir |
| 1615- | 1615-07-03 | Hvalba | - | 20 | 3 | 7 | Lýsi: 43 vágir 7 sk |
| 1615- | 1615-07-25 | Norð í Vági | 116 | 59 | 90 | 5 | Lýsi: 90 vágir 5 sk |
| 1615- | 1615-07-28 | Norð í Vági | 90 | 41 | 61 | | Lýsi: 61 vágir |
| 1615- | 1615-07-28 | Hvalvík & Streymnes | 14 | - | 14 | | Lýsi: 14 vágir |
| 1615- | 1615-07?28 | Norðskála | 32 | - | 20 | | Lýsi: 20 vágir |
| 1615- | 1615-09-01 | Norð í Vági | 70 | 19 | 26 | | Lýsi: 26 vágir |
| 1617- | 1616-09-07 | Norð í Vági | 150 | - | 93 | 10 | Lýsi: 93,5 vágir |
| 1617- | 1616-10-16 | Miðvági | 130 | - | 42 | | Lýsi: 42 vágir |
| 1618- | 1617-08-09 | Hvalba | 40 | - | 33 | | Lýsi: 33 vágir |
| 1618- | 1617-09-05 | Hvalvík & Streymnes | 80 | - | 50 | 10 | Lýsi: 50,5 vágir |
| 1618- | 1618-07-18 | Norð í Vági | 60 | - | 31 | 10 | Lýsi: 31,5 vágir |
| 1619- | 1618-12-13 | Oyri | 150 | - | 128 | | Fisk,Lýsi |
| 1619- | 1619-07-01 | Norð í Vági | 135 | - | 91 | 10 | Fisk,Hosur,Lýsi |
| 1619- | 1619-07-09 | Oyri | 90 | - | 85 | 10 | Fisk,Lýsi |
| 1620 | 1620-08-05 | Vestur í Vágum | 51 | - | 16 | | Fisk: 16 vágir |
| 1621- | 1620-09-16 | Norð í Vági | 240 | 55 | 131 | | Lýsi:131 vágir |
| 1621- | 1621-08-01 | Norð í Sundum.Oyri&Str. | 250 | 93 | 219 | 1 | Lýsi:219 vágir 1 sk |
| 1622- | 1621-09-05 | Norð í Sundum.Oyri&Str. | 500 | - | 410 | | Lýsi:347 vágir, Rest 63 gl |
| 1622- | 1621-09-23 | Miðvági | 250 | - | 54 | 11 | Lýsi: 54,5 vágir 1sk |
| 1622- | 1622-05-26 | Hvalba | 200 | - | 66 | 7 | Lýsi: 66 vágir 7 sk |
| 1623- | 1623-08-20 | Skálafirði | 30 | 6 | 12 | | Rest |
| 1624- | 1623-12-12 | Norð í Vági | 2 | - | 3 | | Reyðar hosur,12 pør |
| 1624- | 1624-08-06 | Streymnes | 100 | - | 51 | | Lýsi: 6 vágir, Rest 45gl |
| 1624- | 1624-08-06 | Oyri | 80 | - | 82 | 5 | Lýsi:15 vágir, Rest 67-5 |
| 1626- | 1626-01-?? | Norð í Vági | 3 | - | 6 | | Lýsi: 6 vágir |
| 1627- | 1626-09-16 | Vestur í Vágum | 100 | 18 | 24 | 5 | Fisk: 24 vágir 5 sk |
| 1628- | 1628-04-24 | Oyri | 40 | 16 | 23 | 18 | Lýsi: 23,5 vágir 8 sk |
| 1628- | 1628-04-24 | Streymnes | 60 | 15 | 23 | | Lýsi: 23 vágir. |
| 1628- | 1628-06-16 | Norð í Vági | 100 | 22 | 35 | 5 | Lýsi: 35 gl 5 sk |
| 1629- | 1629-06-10 | Hvalba | 20 | - | 3 | | Fisk: 8 vágir. |
| 1630- | 1630-04-23 | Hvalvík | 87 | 19 | 25 | 15 | Lýsi: 25,5 gl 5 sk |
| 1636- | 1635-08-20 | Vestur í Vágum | 400 | 54 | 101 | 5 | Fisk, hosur, lýsi |
| 1637- | 1637-07-14 | Norð í Vági | 60 | 10 | 17 | 15 | Lýsi: 17 1/2 vág 5 sk |
| 1638- | 1638-04-02 | Norð í Vági | 56 | 12 | 23 | | Fisk, hosur, lýsi |

FR : Fútaroknskapur,
H : Hvalatal í grindini.
K : Hvalatal í kongspartinum.
GL+SK : Peningavirði í kongspartinum í gyllin og skinn.
Gjald : Vøra, ið kongsparturin er seldur fyri.

Tær einstøku grindirnar verða væl lýstar í roknskapunum, helst óneyðuga væl í mun til roknskaparendamálið. Vit fáa ikki einans at vita, hvat kongur hevur fingið burtur úr í peningi og hvørji vøru, goldið er við. Vit fáa eisini javnan upplýst, nær grindin doyði, hvar hon doyði, hvussu nógvur hvalur var í grindini og hvussu nógvan hval, kongur fekk úr grindini. Í talvu 1 eru hesir upplýsingar settir upp í tíðarrøð. Upplýsingarnir kunnu nýtast at rokna út miðalvirði á grindahvalunum, men í eini grind fáa vit beinleiðis at vita virði á hvørjum einstøkum hvali, sum fall í kongsins part. Greiningin av upplýsingunum fer tí at byrja við hesi grindini.

**Virði á tí einstaka hvalinum.**

Úr grindini í Skálafirði 1588 fekk kongur 23 hvalir í sín part. Hvalirnir vórðu seldir fyri tilsamans 43 gl 5 skinn, sum varð goldið við fiski, ull, skinnum, tálg og smøri. Tað áhugaverda við hesi grindini er, at sølan av kongspartinum er útgreinað. Upplýst verður, hvør keypti hvønn einstakan hval, hvat hann kostaði og hvat goldið varð við. Útgreinaða sølan er sett upp í talvu 2, tó uttan at nøvn keyparana eru tikin við. Nevnt kann tó verða, at keypararnir koma víða úr landinum: Nólsoy, Koltri, Sandoy, Gjógv, Havn, Nesi, Viðareiði, Hvannasundi, Norðoyri, Kunoy, Elduvík, Húsum, Mikladali og Lamba.

*Talva 2. Sølan av kongspartinum í Skálafirði 1588.*

| Tal | Prísur Gl | Sk | Gjald | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 2 1/2 | 5 | Fiskur: | 2 1/2 vág 5 skinn. |
| 1 | 1 | | Fiskur: | 1 vág. |
| 1 | 2 | | Fiskur: | 2 vágir. |
| 1 | 3 | | Fiskur: | 2 vágir, skinn: 20. |
| 1 | 2 | | Fiskur: | 2 vágir. |
| 1 | 2 | | Fiskur: | 2 vágir. |
| 2 | 4 1/2 | | Fiskur: | 4 1/2 vág. |
| 1 | 1 | 5 | Fiskur: | 1 vág 5 skinn. |
| 1 | 1 | | Fiskur: | 1 vág. |
| 1 | 2 1/2 | | Skinn: | 1 kippa (=40), ull: 1/2 vág. |
| 1 | 2 | 5 | Fiskur: | 2 vágir 5 skinn. |
| 1 | 2 | | Fiskur: | 2 vágir. |
| 1 | 1 | | Fiskur: | 1 vág. |
| 1 | 1/2 | | Fiskur: | 1/2 vág. |
| 1 | 5 | | Fiskur: | 5 skinn. |
| 1 | 2 1/2 | | Tálg: | 2 1/2 vág. |
| 1 | 2 1/2 | | Tálg: | 1 vág, fiskur: 1 vág, skinn: 10 |
| 1 | 1 | 5 | Fiskur: | 1 vág 5 skinn. |
| 1 | 3 | | Smør: | 1 vág, fiskur: 1 1/2 vág. |
| 1 | 2 1/2 | | Fiskur: | 2 1/2 vág. |
| 1 | 1 1/2 | | Fiskur: | 1 1/2 vág. |
| 1 | 2 | | Fiskur: | 2 vágir. |
| 23 | 43 gl 5 sk | | Tilsamans = 37,4 skinn í miðal. | |

Sum tað sæst á talvu 2, er bíligasti hvalurin seldur fyri 5 skinn og tann dýrasti fyri 3 gl, t.e. 60 skinn. Miðalvirði á teimum 23 hvalunum er 37,4 skinn. Prísurin á hesi grindini er nógv hægri enn tað skinnatal, vit kenna nú á døgum, tá bert hendinga hvalur er størri enn 1 gyllin. Í hesi grindini liggja 17 hvalir oman fyri ta meting, vit kenna, og bert 6 hvalir eru at finna innan karmarnar á kendari meting nú á døgum. Hesir 6 hvalirnir hava tó verið smáir, sammett við hvalirnar í kongspartinum annars, og sum heild mugu vit halda, at grindaprísirnir í Skálafirði 1588 hava verið einar 5 ferðir hægri enn núverandi metingin.

**Miðalvirði á kongshvalunum.**

Eru grindaprísirnir í Skálafirði 1588 eindømi? Hevur so lítið verið til av grind tað árið, at menn, sum tað sæst í sølulistanum, eru komnir úr tí mesta av landinum at keypa grind og tískil hava trýst prísin upp í óvanligar upphæddir? Vit hava ongan annan útgreinaðan sølulista í fútaroknskapunum, men vit hava 20 grindir, har bæði samlaða virði av grind og talið av hvalum, sum fall í kongsins part, er upplýst. Í hesum grindum kunnu vit rokna út miðalvirði av kongshvalunum í grindini. Hesir upplýsingar eru settir upp í talvu 3 saman við útrokningini av miðalvirði.

*Talva 3: Virði í kongspartinum.*

| Grind | | H | K | K% | Virði Skinn | Miðalvirði Skinn |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Skálafirði | 1588 | | 23 | — | 865 | 37.4 |
| Norð í Vági | 1599 | 90 | 23 | 26 | 1100 | 47.8 |
| Hvalvík | 1600 | 24 | 8 | 33 | 400 | 50.0 |
| Norð í Vági | 1613 | 30 | 8 | 27 | 385 | 48.1 |
| Vestur í Vágum | 1613 | 50 | 7 | 14 | 300 | 42.9 |
| Norð í Vági | 1615 | 116 | 59 | 51 | 1805 | 30.5 |
| Norð í Vági | 1615 | 90 | 41 | 46 | 1220 | 29.8 |
| Hvalba | 1615 | | 20 | — | 867 | 43.4 |
| Norð í Vági | 1615 | 70 | 19 | 27 | 520 | 27.4 |
| Norð í Vági | 1620 | 240 | 55 | 23 | 2620 | 47.6 |
| Norð í Sundum | 1621 | 250 | 93 | 37 | 4381 | 47.1 |
| Skálafirði | 1623 | 30 | 6 | 20 | 240 | 40.0 |
| Vestur í Vágum | 1626 | 100 | 18 | 18 | 485 | 26.9 |
| Oyri | 1628 | 40 | 16 | 40 | 478 | 29.9 |
| Streymnesi | 1628 | 60 | 15 | 25 | 460 | 30.7 |
| Norð í Vági | 1628 | 100 | 22 | 22 | 705 | 32.0 |
| Hvalvík | 1630 | 87 | 19 | 22 | 515 | 27.1 |
| Vestur í Vágum | 1635 | 400 | 54 | 14 | 2025 | 37.5 |
| Norð í Vági | 1637 | 60 | 10 | 17 | 355 | 35.5 |
| Norð í Vági | 1638 | 56 | 12 | 21 | 460 | 38.3 |
| Tilsamans | | | 528 | | 20176 | 38.2 |

H : Hvalatal í grindini.
K : Hvalatal í kongspartinum.
K%: Procentpartur kongs av hvalatalinum.

Kongur hevur fingið úr 14 upp í 51% av hvalatalinum í einstøku grindunum.

Miðalvirði av 528 seldum kongshvalum í tíðarskeiðinum 1588-1638 var 38.2 skinn. Sølan av kongshvalum á Skálafirði 1588 hevur tí ligið beint undir miðal, og vit fáa upp aftur hægri miðalvirði í teimum einstøku grindunum, heilt upp í 50 skinn í miðal fyri teir 8 hvalirnar, sum seldir vórðu í Hvalvík 1600.

Miðalvirði á kongshvalunum kann sostatt við vissu sigast at liggja fleiri ferðir hægri enn tann grindameting, vit kenna nú á døgum.

**Miðalvirði í grindini**

Tað mesta, kongur kann fáa burtur úr eini grind, er allan jarðarhvalin (45% av allari grindini) + 1/4 av tíggjundini (2,5%) = 47,5%. Hetta átti hann at fingið á Oyri, har øll jørðin er kongs, men í 1628 hevur hann einans tikið 40% av hvalatalinum har, ella 2 hvalir ov lítið. Norðuri í Vági hevur hann í 1615 afturfyri tikið heili 51% av hvalatalinum, ella einar 7 hvalir fleiri, enn hann á nakran hátt kundi hava rætt til. Hetta bendir á, sum rímiligt er, at tað er hvalavirði, teir hava roynt at býtt, heldur enn hvalatalið.

Í øllum grindum kenna vit tað peningavirði, kongur hevur fingið burtur úr grindini. Í nærum øllum grindum kenna vit samlaða hvalatalið í grindini. Um vit eisini vita, hvussu stóran part av jarðarhvalinum, kongur hevur havt rætt til, ber til at rokna seg fram til samlaða virði í tí einstøku grindini, og síðan miðalvirði av hvalunum. Hesar útrokningar verða fyri hvørja hvalvág sær gjørdar í Appendix, sum víst verður til.

Kanningin av hvalvágunum bendir á, at hvalvágirnar hava ikki verið lagdar saman í tíðarskeiðinum 1584-1638. Jarðarhvalur hevur verið tikin av markatalinum í hvørji markatalsbygd sær, og líkt er til, at eisini býlingarnir norðuri í Vági hava tikið jarðarhval hvør sær. Seinri, men langt undan 1695, er hvalvágin norðuri í Vági løgd saman.

Av teimum 44 skrásettu grindunum í tíðarskeiðnum hava 4 ikki verið skiftar sum grind. Tær 3 eru bert fáir hvalir, men tann 4. er heilar 40 hvalir, sum helst sjálvir hava gjørt landgongd í Hvalba í 1617. Talið á grindum í tíðarskeiðnum eigur harumframt at verða lækkað við teimum báðum dupult skrásettu grindunum á Oyri og Streymnesi 1624 og 1628, so veruliga talið á skrásettum grindadrápum í tíðarskeiðnum verður 38.

Tað er vert at hefta seg við, at enn í 1635 tók kongur jarðarhval av náðisgørðunum. Nær prestur/prestaeinkjurnar hava fingið henda jarðarhvalin er tí óvist, men tað er hent fyri 1709, tá Kommissionsbetænkningen (bls. 81) sigur, at prestaeinkjurnar taka jarðarhval av náðisgørðunum.

Úrslitið av útrokningunum í Appendix er sett upp í talvu 4.

Miðalvirði á grindahvalunum í teimum grindum, har tað hevur kunnað verið roknað, liggur úr 20.6 skinn og upp í 67 skinn, og samsvarar tað heilt væl við miðalvirðið á kongshvalum, sum áður varð roknað út. Bert er munurin millum bíligastu og dýrastu grindirnar vorðin størri. Grindaprísirnir tykjast vera ógvuliga ójavnir frá grind til grind. Um hetta er vegna skiftandi eftir-

*Talva 4*

| ÁR | STAÐUR | H | K | K% | KSK | MVK | SVSK | MV | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1584-06-24 | L.Dímun | 4 | - | - | 90 | | | | * |
| 1588 | Skálafirði | - | 23 | - | 860 | 37.4 | 5375 | | |
| 1599-11-14 | Norð í Vági | 90 | 23 | 25.6 | 1100 | 47.8 | | | |
| 1600-09-04 | Hvalvík | 24 | 8 | 33.3 | 400 | 50.0 | 1391 | 58.0 | |
| 1602-08-08 | Streymnes | 60 | - | | 970 | 3880 | 64.7 | | |
| 1613-05-22 | Norð í Vági | 30 | 8 | 26.7 | 385 | 48.1 | | | |
| 1613-07-14 | Miðvági | 50 | 7 | 14.0 | 300 | 42.9 | 1920 | 38.4 | |
| 1614-07-05 | Oyri & Streymnes | 72 | - | | 2500 | | | | |
| 1614-07-08 | Miðvági | 37 | - | | 200 | | 1280 | 34.6 | |
| 1614-08-18 | Hvalba | 50 | - | | 500 | | 3350 | 67.0 | |
| 1615-07-03 | Hvalba | - | 20 | | 867 | 43.4 | 5810 | | |
| 1615-07-25 | Norð í Vági | 116 | 59 | 50.9 | 1800 | 30.5 | | | |
| 1615-07-28 | Hvalvík & Streymnes | 14 | - | | 280 | | | | |
| 1615-07-28 | Norð í Vági | 90 | 41 | 45.6 | 1220 | 29.8 | | | |
| 1615-07?28 | Norðskála(Oyri) | 32 | - | | 400 | | 842 | 26.3 | |
| 1615-09-01 | Norð í Vági | 70 | 19 | 27.1 | 520 | 27.4 | | | |
| 1616-09-07 | Norð í Vági | 150 | - | | 1870 | | | | |
| 1616-10-16 | Miðvági | 130 | - | | 840 | | 5376 | 41.4 | |
| 1617-08-09 | Hvalba | 40 | - | | 660 | | | | * |
| 1617-09-05 | Hvalvík & Streymnes | 80 | - | | 1010 | | | | |
| 1618-07-18 | Norð í Vági | 60- | | | 630 | | | | |
| 1618-12-13 | Oyri | 150 | - | | 2560 | | 5389 | 35.9 | |
| 1619-07-01 | Norð í Vági | 135 | - | | 1830 | | | | |
| 1619-07-09 | Oyri | 90 | - | | 1710 | | 3600 | 40.0 | |
| 1620-08-05 | Miðvági | 51 | - | | 320 | | 2048 | 40.2 | |
| 1620-09-16 | Norð í Vági | 240 | 55 | 22.9 | 2620 | 47.6 | | | |
| 1621-08-01 | Oyri & Streymnes | 250 | 93 | 37.2 | 4381 | 47.1 | | | |
| 1621-09-05 | Oyri & Streymnes | 500 | - | | 8200 | | | | |
| 1621-09-23 | Miðvági | 250 | - | | 1091 | | 6982 | 27.9 | |
| 1622-05-26 | Hvalba | 200 | - | | 1327 | | 8893 | 44.5 | |
| 1623-08-20 | Skálafirði | 30 | 6 | 20.0 | 240 | 40.0 | 1500 | 50.0 | |
| 1623-12-12 | Norð í Vági | 2 | - | | 60 | | | | * |
| 1624-08-06 | Streymnes | 100 | - | | 1020 | | 4080 | 40.8 | a |
| 1624-08-06 | Oyri | 80 | - | | 1645 | | 3467 | 43.3 | a |
| 1626-01-?? | Norð í Vági | 3 | - | | 120 | | | | * |
| 1626-09-16 | Miðvági | 100 | 18 | 18.0 | 485 | 26.9 | 3104 | 31.0 | |
| 1628-04-24 | Oyri | 40 | 16 | 40.0 | 478 | 29.9 | 1006 | 25.2 | b |
| 1628-04-24 | Streymnes | 60 | 15 | 25.0 | 460 | 30.7 | 1840 | 30.7 | b |
| 1628-06-16 | Norð í Vági | 100 | 22 | 22.0 | 705 | 32.0 | | | |
| 1629-06-10 | Hvalba | 20 | - | | 160 | | 1072 | 53.6 | |
| 1630-04-23 | Hvalvík | 87 | 19 | 21.8 | 515 | 27.1 | 1791 | 20.6 | |
| 1635-08-20 | Miðvági | 400 | 54 | 13.5 | 2025 | 37.5 | 12960 | 32.4 | |
| 1637-07-14 | Norð í Vági | 60 | 10 | 16.7 | 355 | 35.5 | | | |
| 1638-04-02 | Norð í Vági | 56 | 12 | 21.4 | 460 | 38.3 | | | |

H Hvalatal í grindini
K Hvalatal í kongspartinum
K% Procentpartur kongs av hvalatalinum
KSK Virði á kongspartinum í skinnum
MVK Miðalvirði á kongshvalunum í skinnum
SVSK Samlað virði í grindini í skinnum
MV Miðalvirði á øllum hvalum í skinnum

* ikki skift sum grind.
a+a sama grindin
b+b sama grindin



*Nýingarnir í Lítlu Dímun. Elsta varðveitta umrøða av grind í Føroyum. Úr fútaroknskapinum 1584.*

spurning, ella tað kann hava aðrar orsøkir, er ilt at siga.

Hóast tað nógva av grindini hevur verið etið, hevur nakað væl av spiki verið nýtt til lýsi, og lýsiprísirnir hava tískil havt sína stóru ávirkan á grindaprísirnar, sum hvalaroknskapurin og aðrar keldur vísa (Svabo, 1779:49). Men lýsiprísurin tykist hava verið støðugur alt tíðarskeiðið. Lýsi varð vegið, og 1 vág av lýsi kostaði 1 gl alt tíðarskeiðið. 6 vágir gingu í lýsitunnuna.

**Niðurstøður og umrøða**

Í sambandi við nýingarnar í Lítlu Dímum varð meting umrødd og eisini mangan í sambandi við funnan hval. Her er tó einans

talan um prísmeting, tað kongsparturin átti at verða seldur fyri. Í sambandi við grind er tað søluprísurin á kongspartinum, sum verður uppgivin í hvalaroknskapunum.

Í hvalaroknskapunum finst einki tekin til eina serliga grindameting, eitt skinnatal, sum ikki samstundis er dagsprísurin. Tað sæst heldur einki til, at øll grindin er mett undan skiftinum. Samlaða talið í grindini er so at siga altíð nevnt, men ikki i einum einasta føri er eitt samlað skinnatal fyri alla grindina at finna. Niðurstøðan má tí í fyrstu atløgu vera, at eingi prógv eru fyri, at grind undan skiftinum hevur verið mett í skinnatal í hesum tíðarskeiði. Hóast mær lítið dámar at nýta negativa próvførslu, meti eg tó, at tilfarið, her er nýtt, er somikið stórt og eintýðugt, at grundarlag er fyri teirri víðari niðurstøðuni, at í tíðarskeiðinum 1584-1638 varð eingin almenn meting gjørd undan skiftinum.

Hevði meting av allari grindini í eitt serligt skinnatal í grind verið til hetta tíðarskeiðið, hevði tað ætlandi onkunstaðni verið nevnt í hvalaroknskapunum, tí skinnatalið hevði tá roknskaparliga havt størri áhuga enn samlaða hvalatalið.

Serliga skinnatalið í grind, ólíkt prísinum, tykist tí vera eitt yngri fyribrygdi, sum stavar frá, at menn seinri eru farnir at meta alla grindina sum grundarlag undir skiftinum. Hetta samsvarar við tað, sum Lucas Debes seinri greiðir frá. Lucas Debes ger nógv burtur úr grind og øðrum hvali (1673:155-172). Um grindaskiftið sigur hann (bls. 159): »Naar all Hvalen saaledis er opført paa det tørre oc er talt: aftagis først Tienden; dernæst Findings-Hval for den som først saae den; Resten delis udi to Parter / den ene Part til Folket / den anden til den som eyer Landet / enten det er Kongen / Adel eller Odels-Mand«. Lucas Debes sigur, at grindin verður **tald**, men einki orð verður sagt um meting av allari grindini, og tað mundi ein væntað, um nøkur meting hevði verið gjørd tá.

Hvussu grindaskiftið í praksis er farið fram, tá eingin meting er gjørd, ber illa til at siga. Vit kunnu tó hugsa okkum, at roynt hevur verið at skifta grindina so rættvíst sum gjørligt, t.d. sum tá menn býta fiskin, teir hava fingið ein dag á floti, stóran hval móti stórum hvali og minni hval móti minni hvali. Um teir beinleiðis hava mátað einstaku hvalirnar undir skiftinum, vita vit ikki, men at hvalur varð mátaður, fáa vit at vita undir sakarmálinum móti Ólavi Larvassyni. Hvalirnir, hann skutlaði, verða sagdir at vera 1 lítil, annar 4 alin og tann triðji 6 alin.

Hvør, ið hevur staðið fyri skiftinum hetta tíðarskeiðið, vita vit heldur ikki. Nú er tað sýslumaðurin, og hann hevur eisini í hesum tíðarskeiði kongsins vegna havt nógv við grindina at gera. Uppgáva hansara hevur verið at ansa eftir, at kongur fekk tað, hann átti av grindini. Hann hevur tikið ímóti inntøkum kongs av hvali, sum hann síðan hevur sent fútanum, og sambært grannskoðaraviðmerkingum á breddunum í hvalaroknskapunum hevur hann árliga latið fútanum »bevis« yvir hesa inntøku kongs, sum hevur verið hjálagt fútaroknskapinum sum skjal, onkuntíð sagt at vera »forseglet«. Eingi av hesum sýslumansskjølum tykjast vera varðveitt.

Í 1709 finna vit metingina umrødda fyri fyrstu ferð. Kommissionsbetænkningen

(1709-10:79-80) sigur, at fyrst verður finningarfiskurin tikin av, »derefter vurderes de allesammen, smaa og store, af Mænd, som dertil af Fogden bliver udnævnt, og det enhver Fisk med sit Nummer og Værdi«. Hetta er sostatt fyrstu ferð, at sagt verður frá, at øll grindin verður mett, og haldi eg, at illa ber til at koma til aðra niðurstøðu enn, at almenna metingin av grindini er fyriskipað onkuntíð í tíðarskeiðinum 1673-1709 fyri at kunna fáa betur grundarlag undir skiftinum. Eins og seinri verður hvør hvalur merktur við nummari og metingarvirði.

Almenna grindametingin í skinnatal hevur sostatt sín uppruna í seinra parti av gablatíðini. Grundarlagið undir metingini er peningavirði, dagsprísurin, sum hann man hava verið seinast í 1600 árunum ella um 1700.

Í 1700 árunum kunnu vit rokna við, at munur gerst á grindameting og grindaprísum (smb. Svabo, 1779:48). Ætlandi hevur lýsiprísurin havt stóran týdning fyri prísgongdina. Fyri grindaskiftið fáa eisini onnur viðurskifti týdning. Samanlegging av hvalvágum er helst byrjað í 1600 árunum, men heldur áfram í 1700 árunum, og í 1700 árunum – eftir 1709 – veksur fram tað tiltikna sosiala elementið í grindaskiftinum, har bæði omman á bríkini og barnið í vøgguni fáa part. Grindadistriktini, sum verða fyriskipað í 1832, eru úrslit av hesi gongd. Sosiala javnanin er tó einans ein javnan av tí helmingi av grindini, sum grindamenninir áttu rættin til. Jarðarhvalurin varð ikki nortin fyrr enn í 1832.

Upplýsingarnar um grind verða í 1700 árunum nógv fjøllbroyttari og rúgvismiklari enn áður. Framhaldandi rannsóknir, sum kunnu royna tær niðurstøður, eg her eri komin til, og kunnu lýsa søguligu gongdina frá Lucas Debes til Grindareglementið, hava ørgrynnu av keldum at oysa úr. Í tí tíðarskeiðinum hendir framvøksturin av teirri skipan av grindaskiftinum, sum vit kenna.

**Takkir**

Dorete Bloch, Náttúrugripasavnið eigur stóra tøkk fyri áhaldandi eggjan at fara undir hesa kanning og fyri mangar áhugaverdar samrøður. Fyri hjálp og vegleiðing við formlum og metingum av taltilfarinum takki eg Petur Zachariasen, Fróðskaparsetrið, og starvsfólkinum á Landsskjalasavninum takki eg hjartaliga fyri ta hjálp og beinasemi, har altíð verður sýnd.

## Appendix: Hvalvágirnar í fútaroknskapunum 1584-1638

Kongsjørðin er ymiskur partur av markatalinum frá bygd til bygd. Fyri at kunna vita, hvussu nógv kongur átti av grindini, mugu vit tí kenna samlaða markatalið, sum tók jarðarhval í hvørji hvalvág sær og støddina av kongsjørð í sama markatali. Kenna vit hetta, kunnu vit rokna kongspartin av grindavirðinum út eftir hesum formli:

$$k=t(1/40+9/20*j/m)$$

har k=kongspartur, t=øll grindin, j=kongsjørðin og m=markatalið. 1/40 er fjórðingur kongs av tíggjundini og 9/20 er jarðarhvalurin eftir at tíggjundin er tikin burtur av. Í formlinum er ikki hugsað um finningarfiskin, sum í hesum sambandi hevur lítlan týdning.

**Nýingarnir í Lítlu Dímun**

»Sankt Hans dag udi sommer, udi en gruelig kulde og fogsne, som skete på Færø, da var af Guds forsyn og underbarlig hændelse udi land kommet på Lille Dimenn 4 små hvalfisk, som kaldes Nyinnger. Prouistenn Simen Jennssen på Suderrø annamede Kongelig Majestæts part af fornævnte 4 hvalfisk, som blev vurderet for Gylden 4 1/2, der på oppebåret Fisk 2 vager. Rest 2 1/2 gylden.« Sí myndina á síðu 68.

Soleiðis ljóðar, í eitt sindur nútíðargjørdari rættskriving, elsta varðveitta frágreiðingin um grind í Føroyum í fútaroknskapinum fyri 1584. Hnýðingr er norrøna heitið á tí hvali, vit nú nevna grindahval, eitt orð, sum um hetta mundið er um at treingja norrøna orðið burtur. »Hualsgrind« verður umrødd av P. Claussøn Friis í 1592 (Dahl, 1962:166), og Ólavur Larvasson skutlaði »grindhvale« í 1619. Orðið grind verður tó ongatíð nevnt í fútaroknskapunum 1584-1653, bert små hvalfisk e.t. Annað dømi um málsliga afturhaldið í somu fútaróknskapum er, at gyllin í jørð ikki eina ferð verður nevndur, hóast gyllinsmetingin í jørð tá var vanlig millum manna.

Prósturin (t.e. sýslumaðurin) tekur við kongspartinum. Sum Louis Zachariasen (1953:89) førir fram, er Lítla Dímun øll kongs, og kongur hevur tí fingið allan jarðarhvalin. Men nýingarnir í Lítlu Dímun hava ikki verið riknir á land. Her er talan um hval, sum er funnin upprikin (Bjørk, 1963:182), og hava hvalirnir tí ikki verið skiftir sum grind. Um rekahval sigur MLL VII-64-5: »Nu ræker hval paa nogen mands land, enten inden- eller utengards, da eier kongen den halve og landdrotten den halve, undtagen finderspækket —-«. Í hesum føri hevur kongur sostatt fingið allar nýingarnar, undantikið »finderspæk« og tíggjund.

**Grindir í Hvalba**

Í Hvalba eru 5 grindir skrásettar hetta tíðarskeiðið. Kongur eigur 26 1/2 mørk í festijørð, umframt prestagarðin, sum prestur tekur jarðarhvalin av.

Markatalið í Hvalba er tíverri ógreitt. Nú verður tað sett til 97 mk 5 gl, Svabo (1781) hevur 98 mk 4 gl og elsta varðveitta Matrikulbókin frá 1705 hevur 97 1/2 mk. Ólagið tykist mest at stava frá prestaskeiði Hans Hanssøn Hardis (1630-55), tá m.a. ein lunnindaleys mørk fekk áseyð í 1647 (Andersen, 1895:435; Degn, 1945:250; Tingbókin, 1615-55:376-77). Eg meti, at rætta markatalið er 96 mk, men full vissa er tó ikki fyri, at grind hevur verið skift til 96 mk í tíðarskeiðnum 1584-1639.

Nýta vit 96 mk verður kongsparturin

$$k=t(1/40+9/20*26.5/96) = 14.92\%$$

Samlaða virði á kongspartinum kenna vit. Her er tað umroknað til skinn (KSK). Miðalvirði á kongshvalunum (MVK) kendu vit frammanundan bert í grindini 1615, men nú ber til at rokna út samlaða peningavirði í allari grindini í skinnum (SVSK). Samlaða virðið á grindini kann síðan verða býtt við hvalatalinum í grindini, og fáa vit tá miðalvirði (MV) á hvalunum, roknað í skinnum.

| ÁR | H | K | K% | KSK | MVK | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1614-08-18 | 50 | - | - | 500 | - | 3351 | 67.0 |
| 1615-07-03 | - | 20 | - | 867 | 43.4 | 5811 | - |
| 1617-08-09 | 40 | - | - | 660 | - | 4424 | 110.6 |
| 1622-05-26 | 200 | - | - | 1327 | - | 8894 | 44.5 |
| 1629-06-10 | 20 | - | - | 160 | - | 1072 | 53.6 |

Miðalvirði á øllum kendum kongshvalum í Føroyum var 38.2 skinn og fevndi í teimum einstøku grindunum úr 26.9 til 50 skinn. Virðini í Hvalba liggja nakað væl hægri. Kongshvalirnir í grindini 1615 kostaðu 43.4 skinn í miðal, og grindirnar 1622 og 1629 eru í hægra enda av tí príslegu, vit kenna. Grindin 1614 hevur eitt óvanliga høgt miðalvirði, men 110.6 skinn í miðal fyri hvalin, sum vit siggja í 1617, liggur langt oman fyri alt mark (sí talvu 4). Har ruggar ikki alt rætt. Annaðhvørt er her ikki talan um grind, hóast døglingur vanliga – og longu í 1584 (smb. tó Lockwood, 1995: 75) – verður nevndur við navni, ella er okkurt tal skeivt í roknskapinum – ella er hetta ikki rikin grind, men 40 hvalir, sum eru funnir deyðir á sandinum, og skiftir sum rekahvalur (smb. Lucas Debes, 1673:159-60).

Um grindina 1615 er annars at viðmerkja, at talið á hvalum í grindini er ikki kent. Tá grindahagtøl siga hesa grindina vera 20 hval er tað skeivt. Hetta er kongsparturin, og grindin hevur heldur ligið um 135 hval.

## Grindir vesturi í Vágum

Vesturi í Vágum eru skrásettar 7 grindir hetta tíðarskeiðið, men bert í 2 førum er tilskilað í Miðvági, 1616 og 1621. Hinar grindirnar kunnu tí hava verið vestanfyri, í Seyrvági ella Bø. Vanligt er (Bjørk, 1963: 230; Joensen og Zachariassen, 1982: 6. talva) at rokna við, at allar 7 grindirnar eru deyðar í Miðvági, men áðrenn vit góðtaka tað, skulu vit hyggja at møguleikunum vestanfyri.

Eingin grind sæst at vera deyð í Seyrvágsfirði fyrr enn 1813.

Í Seyrvági var eingin kongsjørð. Kongsparturin í grind er tí bert tíggjundin:

$$k=t/40 = 2.5\%$$

| ÁR | H | K | K% | KSK | MVK | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1613-07-14 | 50 | 7 | 14 | 300 | 42.9 | 12000 | 240 |
| 1614-07-08 | 37 | - | - | 200 | | 8000 | 216 |
| 1620-08-05 | 51 | - | - | 320 | | 12800 | 251 |
| 1626-09-16 | 100 | 18 | 18 | 485 | 26.9 | 19400 | 194 |
| 1635-08-20 | 400 | 54 | 14 | 2025 | 37.5 | 81000 | 203 |

Av teimum grindum, har vit kenna hvalatalið í kongspartinum, hevur kongur fingið 5-7 ferðir so nógvan hval, sum hann átti at fingið í Seyrvági. Miðalvirðini liggja oman fyri alt mark (sí talvu 4). Hesi tøl siga, at eingin av hesum grindum kann vera deyð í Seyrvági.

Markatalið í Bø er 18 mk. Kongsjørðin var – og er – 13 1/4 mk.

Kongsparturin í grind verður sostatt:

$$k=t(1/40+9/20*13.25/18) = 35.6\%$$

| ÁR | H | K | K% | KSK | MVK | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1613-07-14 | 50 | 7 | 14 | 300 | 42.9 | 842 | 16.8 |
| 1614-07-08 | 37 | - | - | 200 | - | 561 | 15.2 |
| 1620-08-05 | 51 | - | - | 320 | - | 898 | 17.6 |
| 1626-09-16 | 100 | 18 | 18 | 485 | 26.9 | 1362 | 13.6 |
| 1635-08-20 | 400 | 54 | 14 | 2025 | 37.5 | 5688 | 14.2 |

Um hesar grindir eru deyðar í Bø, hevur kongur bert tikið millum helvt og triðjing av tí hvalatali, hann átti. Samstundis hava kongshvalirnir í miðal havt tað virði, sum er vanligt hetta tíðarskeiði, meðan hinir hvalirnir í grindini hava óvanliga lágt virði. Eisini hesi tøl vísa, at eingin av hesum 5 grindunum er deyð í Bø. Allar 7 grindirnar í Vágum hetta tíðarskeiði kunnu tí við vissu

sigast at vera deyðar í Miðvági.

Í Miðvági eru 48 mk í jørð. Festijørðin var tá 14 mk. Kongsparturin í Miðvági verður sostatt:

$$k=t(1/40+9/20*14/48) = 15.63\%$$

Á sama hátt sum í Hvalba, kunnu vit nú rokna út miðalvirði á hvalunum í grindini:

| ÁR | H | K | K% | KSK | MVK | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1613-07-14 | 50 | 7 | 14 | 300 | 42.9 | 1919 | 38.4 |
| 1614-07-08 | 37 | - | - | 200 | - | 1280 | 34.6 |
| 1616-10-16 | 130 | - | - | 840 | - | 5374 | 41.3 |
| 1620-08-05 | 51 | - | - | 320 | - | 2047 | 40.1 |
| 1621-09-23 | 250 | - | - | 1091 | - | 6980 | 27.9 |
| 1626-09-16 | 100 | 18 | 18 | 485 | 26.9 | 3103 | 31.0 |
| 1635-08-20 | 400 | 54 | 14 | 2025 | 37.5 | 12956 | 32.4 |
| Tilsamans | 550 | 79 | 14.4 % | | | | |

Í teimum 3 grindunum, har vit kenna bæði talið á grindini og kongspartinum úr henni, hevur kongur í miðal tikið 14.4 % av hvalatalinum.

Tað sæst, at í Miðvági sýna øll miðalvirðini tær upphæddir, sum vóru vanligar í tíðarskeiðinum.

Í 1632 fóru 6 mk burturav kongsjørðini í Miðvági, tá Kálvalíð gjørdis náðisgarður. Náðisgarðarnir vórðu í 1673 latnir presta-einkjunum í kallinum. Prestarnir tóku sjálvir jarðarhvalin av prestagørðunum, og Kommissionsbetænkningen (1709-10:81) upplýsir, at prestaeinkjurnar tá tóku jarðarhvalin av náðisgørðunum. Tað hevði tí verið rímiligt at hugsa sær, at prestarnir longu í 1632 tóku jarðarhvalin av náðisgørðunum, men tá hevði kongsparturin í grindini 1635 bert verið 10% og hevði tað givið hesi tøl:

| ÁR | H | K | K% | KSK | MVK | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1635 | 400 | 54 | 14 | 2025 | 37.5 | 20250 | 50.6 |

Kongur hevði tikið 14 hval fleiri, enn hann átti, miðalvirði hevði verið óvanliga høgt fyri Miðvág, og munurin á kongshvalunum og grindini annars hevði verið órímiliga stórur. Eg meti tølini prógva, at kongur framvegis tekur jarðarhvalin av náðisgørðunum í 1635. Broytingin er helst ikki komin í fyrr enn 1673.

## Grindir norð í Sundum

Hvalvágin Norðuri í Sundum (Hvalvík, Streymnes og Oyri) var samanløgd undan 1781 (Svabo 1781-82:254), men fyri tað er ikki vist, at hon eisini hevur ligið saman í tíðarskeiðnum 1584-1638, tá 14 grindir eru skrásettar í Hvalvík, Streymnesi og á Oyri, umframt 1 við Norðskála. Fyri at vita, hvussu grindin hevur verið skift, er tað tó neyðugt at vita, um jarðarhvalurin fellur til hvørja bygd sær, ella um bygdirnar hava ligið saman. Her skal tí verða kannað, hvat fútaroknskapirnir siga um hvalvágna.

1600-09-04: udi Qualuig (24 hval),
1602-08-08: udi Strømeness (60 hval),
1614-07-05: Paa Øre och Strømmenes Land (72 hval),
1615-07-28: Paa Qualuig och Strømmennes Lannd (14 hval),
1615-07-28?: Noch Indkom der sammesteds Norder wid skaale paa Østerø Land (32 hval)( stendur beint eftir fyrru grindina),
1617-09-05: Paa qualvig och Strømness Lannd (80 hval),
1618-12-13: paa Øre Land (150 hval),
1619-07-09: paa Øre Land (90 hval),
1621-08-01: Norder i Sundet, Paa Ørre och Strømenes Land (250 hval), »deraf tillfalt Kong. Mayts. Paa Begge land 93 fiske«,
1621-09-05: Norder i Sundet paa Øre och Strømnes Land (500 hval),
1624-08-06: wed Strømnes Land j Strømøø (100 hval),
1624-08-06: Same Dag indkom ved Øre Land j Østerøø (80 hval),
1628-04-24: udj Østerøø, ved Ørreland (40 hval),

1628-04-24: Samme dagh Indkom paa Strømenes Land i Strømøø (60 hval),
1630-04-23: i Strømmøø i Qualuig (87 hval).

Norður í Sundum er nevnt í tveimum grindum 1621, og tá tað um grindina við Norðskála 1615 verður sagt, at hon kom »sammesteds« sum grindin í Hvalvík og Streymnesi, bendir tað á, at allar 4 bygdirnar har norðuri í grindasamanhangi eru nevndar norður í Sundum. Men einki bendir á, at jarðarhvalurin er samanlagdur. Tær 10 grindirnar hava lagt beinini í eini ávísari bygd. Har tvær bygdir eru nevndar, fáa vit ikki at vita, hvussu nógvur hvalur er komin í hvørji bygd sær, men í augustgrindini 1621 á Oyri og Streymnesi verður tilskilað, at kongur hevur fingið 93 hval »paa Begge land«, og kann tað einans fatast á tann hátt, at grindin er skift til hvørt landið sær. Endaligu ásannanina av hesum fáa vit í 1624 og 1628. Bæði hesi ár er grind komin á Oyri og Streymnesi sama dag og er skift í hvørji bygd sær, men rímuligast er at halda, at talan bæði árini er um somu grindina, sum hevur gjørt landgongd báðu megin Sundið.

Niðurstøðan má tí – út frá tekstinum í hvalaroknskapinum – vera, at jarðarhvalur í grindavágni Norður í Sundum hevur ikki verið samanlagdur, men skift hevur verið í hvørji bygd sær, eisini tá sama grindin gjørdi landgongd í tveimum bygdum.

*Grindir í Hvalvík*

Í Hvalvík eru 24 merkur í jørð, og av teimum vóru 14 mk kongs. Kongsparturin í grind í Hvalvík var tí:

k=t(1/40+9/20*14/24) = 28.75%

| ÁR | H | K | K% | KSK | MVK | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1600-09-04 | 24 | 8 | 33 | 400 | 50.0 | 1391 | 58.0 |
| 1630-04-23 | 87 | 19 | 22 | 515 | 27.1 | 1791 | 20.6 |
| Tilsamans | 111 | 27 | 24.32% | | | | |

*Grindir í Streymnesi*

Í Streymnesi eru 12 merkur í jørð, og kongsjørðin er 6 merkur. Kongsparturin í grind var tískil:

k=t(1/40+9/20*6/12) = 25.00%

| ÁR | H | K | K% | KSK | MVK | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1602-08-08 | 60 | - | - | 970 | - | 3880 | 64.7 |
| 1624-08-06 | 100 | - | - | 1020 | - | 4080 | 40.8 |
| 1628-04-24 | 60 | 15 | 25 | 460 | 30.7 | 1840 | 30.7 |

*Grindir í Hvalvík og Streymnesi*

Tvær grindir eru komnar í báðum hesum bygdum, í 1615 og 1617. Av tí at vit ikki vita, hvussu nógv er komið í hvørji bygd sær, er ikki gjørligt at rokna út miðalvirði.

*Grindir á Oyri*

Oyrarbygd var tá 1 kongsgarður við 12 mk í jørð. Kongur tók sostatt allan jarðarhvalin. Kongsparturin í grind var tí tann størst møguligi:

k=t(1/40+9/20*12/12) = 47.50%

| ÁR | H | K | K% | KSK | MVK | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1618-12-13 | 150 | - | - | 2560 | - | 5389 | 35.9 |
| 1619-07-09 | 90 | - | - | 1710 | - | 3600 | 40.0 |
| 1624-08-06 | 80 | - | - | 1645 | - | 3463 | 43.3 |
| 1628-04-24 | 40 | 16 | 40 | 478 | 29.9 | 1006 | 25.2 |

*Grindir í Streymnesi og á Oyri*

Fyri tær 3 grindirnar, sum 1614 og 1621 eru komnar báðu megin sundið, ber líka lítið sum í Hvalvík og á Streymnesi til at rokna út miðalvirðið.

*Grind við Norðskála*

Bygdin við Norðskála hevur bert 4 merkur í jørð. Kongsjørðin er 1/2 mk. Kongsparturin í grind verður tí:

$$k=t(1/40+9/20*0.5/4) = 8.13\%$$

| ÁR | H | K | KSK | MVK | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1615-07?28 | 32 | - | 400 | - | 4920 | 153.8 |

Í mun til tey miðalvirði av grindahvali, sum eru vanlig hetta tíðarskeiðið, eru virðini í hesi grindini oman fyri alt mark. Kongur kann bert hava fingið 2-3 hvalir av 32 við Norðskála, og geva 400 skinn hansara tí 153.8 skinn í miðal. Hetta virðið kann ikki verða góðtikið. Annaðhvørt er her talan um grind, sum er skift sum funnin hvalur, eins og grindin í Hvalba 1617 kann hava verið tað, ella hevur grindin ikki lagt beinini í bygdini Norðskála, men á Oyrarlandinum sunnan fyri Skálá, sum er mark millum bygdirnar. Hevur henda grindin verið skift til markatalið á Oyri, fáa vit hesi virði:

| ÁR | H | K | KSK | MVK | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1615-07?28 | 32 | - | 400 | - | 842 | 26.3 |

sum eru nógv trúligari og fara at verða nýtt í yvirlitinum í talvu 4.

**Grindir í Skálafirði**

Hvalvágin í Skálafirði verður her roknað at hoyra til Skála bygd einsamalla. Vit rokna við, at talan er um tað stað, sum eisini verður nevnt í Skálabotni og ikki nakrar aðrar bygdir við Skálafjørðin.

Markatalið á Skála er 40 mk, og kongur átti tá 12 mk í jørð har. Kongsparturin í grind verður sostatt:

$$k=t(1/40+9/20*12/40) = 16.00\%$$

| ÁR | T | K | K% | KSK | MVK | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1588 | - | 23 | | 860 | 37.4 | 5375 | |
| 1623-08-20 | 30 | 6 | 20 | 240 | 40.0 | 1500 | 50.0 |

**Grindir norðuri í Vági**

Norðuri í Vági er óvist, hvussu stórt markatal hevur tikið jarðarhval. Í 1808 tóku tilsamans 44 mk í Vági, á Myrkjanoyri og í Gerðum jarðarhval (Zachariasen, 1959-61:95), men í Kommissionsbetænkningen (1709-10:83-84) kærdu óðalsmenninir á Uppsølum seg um, at fútin í 1695 hevði tikið frá teimum óðalsrættindini til jarðarhval, sum teir høvdu havt »udi langsommelig Tid« saman við Vági og Myrkjanoyri. Einki verður nevnt um Gerðar, hóast tað er óhugsandi, at Gerðar ikki skuldu verið við, tí Gerðarhagi liggur oman at vágni millum Vág og Myrkjanoyri. Tað er tí ógjørligt at gera sær eina rímuliga trygga meting av jarðarhvalinum í 1584-1638. Harafturat kemur óvissan um, hvør hevur tikið jarðarhval av kleysturjørðini, 10 mk í Vági og 4 mk á Uppsølum. Neyvan er tað kongur, tí kleysturjørðin er ikki at finna í jarðarbókum kongs fyrr enn í 1705. Tað ber tí ikki til at rokna út miðalvirði í grindunum. Men skiftandi kongsparturin av hvalatalinum er áhugaverdur.

Av teimum 14 grindunum, sum eru skrásettar norðuri í Vági hetta tíðarskeiðið, kenna vit í 9 grindum bæði samlaða talið í grindini og hvalatali í kongspartinum umframt virði av kongspartinum.

| ÁR | H | K | KSK | MVK | K% | SVSK | MV |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1599-11-14 | 90 | 23 | 1100 | 47.8 | 25.6 | | |
| 1613-05-22 | 30 | 8 | 385 | 48.1 | 26.7 | | |
| 1615-07-25 | 116 | 59 | 1800 | 30.5 | 50.9 | | |
| 1615-07-28 | 90 | 41 | 1220 | 29.8 | 45.6 | | |
| 1615-09-01 | 70 | 19 | 520 | 27.4 | 27.1 | | |
| 1616-09-07 | 150 | - | 1870 | | | | |
| 1618-07-18 | 60 | - | 630 | | | | |
| 1619-07-01 | 135 | - | 1830 | | | | |
| 1620-09-16 | 240 | 55 | 2620 | 47.6 | 22.9 | | |
| 1623-12-12 | 2 | - | 60 | | | | |
| 1626-01-?? | 3 | - | 120 | | | | |
| 1628-06-16 | 100 | 22 | 705 | 32.0 | 22.0 | | |
| 1637-07-14 | 60 | 10 | 355 | 35.5 | 16.7 | | |
| 1638-04-02 | 56 | 12 | 460 | 38.3 | 21.4 | | |

Skinnavirði, sum kongur fær av teimum fáu hvalunum í 1623 og 1626 er alt ov stórt til, at her kann vera talan um grindaskifti. Heldur eru hesir hvalir skiftir sum funnir hvalir.

Hvalatal kongs er sera ójavnt í mun til alt hvalatalið í teimum ymsu grindunum, úr 16,7% upp í 50,9%. Eg kann ikki taka undir við Louis Zachariasen í uppfatan hansara, at orsøkin til ójavna býtið er, at lógin hevur ikki strangliga verið fylgd (Zachariasen, 1959-61:96). Tað er einki, sum annars bendir á, at grindaskifti skal vera farið so tilvildar fram. Heldur er orsøkin tann, at kongur í teimum ymisku grindunum hevur havt rætt til ymiskan lut av jarðarhvalinum.

Mangan sæst, at menn ivast í, um býlingarnir norðuri í Vági eiga at verða roknaðir sum býlingar ella sum bygdir. Her er avgerðandi, um jarðarhvalur og onnur lunnindi hava ligið saman ella ikki í tíðarskeiðinum 1584-1638. Eg fari her at kanna, hvør lutur kongs hevði verið av grindini, um hvør býlingur sær tók jarðarhval og um nakrir teirra lógu saman:

| | m | j | k% |
|---|---|---|---|
| í Vági | 15 | 4 | 14.5 |
| á Uppsølum | 15 | 0 | 0 |
| í Gerðum | 22 | 22 | 47.5 |
| á Myrkjanoyri | 7 | 7 | 47.5 |
| í Vági+á Uppsølum | 30 | 4 | 8.5 |
| í Vági+í Gerðum+á Myrkjanoyri | 44 | 33 | 36.25 |
| í Vági+á Uppsølum+á Myrkjanoyri | 37 | 11 | 15.9 |
| allir | 59 | 33 | 27.7 |

m : markatal.
j : kongsjørð.
k%: Møguligi procentpartur kongs av hvalatalinum.

Býtið frá 1808, við felags jarðarhvali millum Vág, Gerðar og Myrkjanoyri, ið skuldi givið kongi 36.25% av grindini, verður ikki endurspeglað í nakrari av grindunum 1584-1638. Tann felagsskap millum Uppsalar, Vág og Myrkjanoyri, sum uppsalamenn søgdu hava verið fram til 1695 og sum skuldi givið kongi 15.9% av grindini, ber kanska til at finna í grindini 1637 og kanska onkrum fleiri, men hann er í sjálvum sær ósannlíkur uttan at Gerðar eru við. Tær flestu av grindunum kundu hugsast at avspegla ein felagsskap millum allar býlingarnar, men spjaðingin er ov stór, og størstu frávikini, í 1615 og 1637, gera henda felagsskap ósannlíkan.

Rímiligasta tulkingin av grindabýtinum norðuri í Vági tykist mær vera, at jarðarhvalurin hevur ikki ligið saman. Eystan fyri Ósánna, í Gerðum og á Myrkjanoyri hevur kongur tikið allan jarðarhvalin, men vestan fyri ánna bert til tær 4 kongsmerkurnar í Vági. Grindin 1637 hevur tann mesta verið vestanfyri, juligrindirnar 1615 eystanfyri, og allar hinar hava lagt beinini báðu megin Ósánna og eru býttar til hvønn býlingin sær.

## Bókmentir og styttingar

Andersen, N. 1895. *Færøerne 1600-1709*. København.

Bjørk, E.A. 1963. *Færøsk bygderet III. Strandretten*. Tórshavn.

Bloch, D. og Zachariassen, M. 1989. The »Skinn« Values of Pilot Whales In the Faroe Islands. *North Atlantic Studies* 1: 39-56. Aarhus.

Chr. IV. NL. *Kong Christian den Fjerdes Norske Lovbok af 1604*, udgiven af Fr. Hallager og Fr. Brandt. Christiania 1855.

Claussøn, Peder 1632. *Norriges oc Omliggende Øers sandfærdige Bescriffuelse*. Kiøbenhaffn.

Dahl, Sverri 1962. Hvalfangst. Færøerne. *Kulturhistorisk leksikon for nordisk middelalder* 7:164-168. København.

Debes, Lucas Jacobsøn 1673. *Færoæ et Færoa Reserata*. Kiøbenhafn.

Degn, A. 1945. *Førøske Kongsbønder 1584-1884*. Thorshavn.

Fútaroknskapirnir 1584-1653. Føroya Landsskjalasavn.

*Gulatingslovi*. Umsett av Knut Robberstad. Oslo 1952

Joensen, J.S. og Zachariassen, P. 1982. Grindatøl 1584-1640 og 1709-1978. *Fróðskaparrit* 30: 71-102. Tórshavn.

Johnsen, A.O. 1962. Hvalfangst. Norge. *Kulturhistorisk leksikon for nordisk middelalder* 7. København.

*Kommissionsbetænkningen 1709-10*. Thorshavn 1934.

Lockwood, W.B. 1995. The Faroese whale names. *Fróðskaparrit* 43: 73-84. Tórshavn.

MLL. *Magnus Lagabøters Landslov*. Oversat af Absalon Taranger. Kristiania 1915.

Müller, H.C. 1883. Oplysninger om Grindefangsten paa Færøerne. *Vidensk. Meddel. Nat. Foren.*: 17-47.

*Reglement for Grindefangsten paa Færøerne 1832*. Kjøbenhavn.

*Seyðabrævið*. Føroya Fróðskaparfelag. Tórshavn 1971.

Svabo, Jens Chr. 1779. Om den færøske Marsviin-Fangst. *Det almindelige Danske Bibliothek. Et Maaneds-Skrift*. 3. bd. København.

Svabo, Jens Chr. 1781-82. *Indberetninger fra en Rejse i Færøe*. København 1959.

Thorsteinsson, A. 1993. Merkur, alin og gyllin – gomul føroysk virðismeting. *Frøði* 1: 4-9. Tórshavn.

*Tingbókin 1615-54*. Givið út hevur Einar Joensen. Tórshavn 1953.

Zachariasen, Louis 1959-61. Føroyar sum rættarsamfelag 1535-1655. *Annales Societatis Scientiarum Færoensis. Supplementum* IV. Tórshavn.